# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# VB kann røkka Neistanum

**Stóri spurningurin hetta vikuskiftið er, hvørt Neistin megnar at taka stig frá suvorenu kvinnunum úr Stjørnuni, ella um tær missa á stokkinum, í stríðnum við serliga VB**

HONDBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*



*Ása á Neystabø verður her steðgað í einari roynd at kroysta seg innum Kyndlaverjuna. Slíkur stríðsvilji skal finnast fram, um stig skal takast frá Stjørnuni*

Seinast Neistin spældu móti Stjørnuni var, tá tær vóru á vitjan í Klaksvík, í seinasta dystinum áðrenn jólasteðgin, ta ferðina var talan um átta máls sigur til heimaliðið.

Spurningurin hesaferð er tí, um Neistin kann stjala stig frá Stjørnuni, ella um Stjørnan hinvegin fer at leggja enn størri op millum seg og tættastu kappingarneytar sínar.

Hjá Neistanum verður vónað, at verjan fer at megna at standa ímóti, tá Klaksvíkskvinnur koma stormandi.

### VB hála seg tættari

Hinir dystirnar um vikuskiftið eru eisini áhugaverdir. Vágskvinnur taka á heimavølli móti StÍF, og í mansdeildini, har tveir dystir verða spældir um vikuskiftið er heldur ikki sørt av spenningi. Tá tað so er sagt eru dysturin hjá VB í Vági móti StÍF, kanska tann mest spennandi. VB kunnu, við sigri, samstundis við at Neistin tapir, leggja seg ájavnt Neistan á silvurkrúnuplássinum, ið gevur rætt til FM-finaluna.

### Botnur móti oddi

Í hølliniíKollafirði tekur KÍF móti oddaliðnum StÍF, og har er væntandi at tað fer at vera trupult hjá KÍF, og tó. KÍF eru kendir fyri sín ómetaliga stríðsvilja, so teir kunnu væl geva StÍF ein hvøkk. Tá tað so er sagt, eru StÍF stórfavorittar til at taka stigini.

Í Havn tekur Neistin móti H71, og her er talan um dyst millum nummar 2 og 3. Um Neistin vinnur kunnu teir økja munin niður til H71, til sjey stig, og tað hevði komið væl við hjá havnamonnunum. Um H71 hinvegin vinnur, er bert eittans stig upp til eitt finalupláss, ið sær út til at vera móti vælspælandi strandingunum í StÍF.

**Hondbóltur**

**SUNSET KAPPINGIN – KVINNUR**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 11 | 9 | - | 1 | - | 1 | 313 | 239 | 74 | 19 |
| 2 Neistin | 10 | 7 | - | 0 | - | 3 | 261 | 228 | 33 | 14 |
| 3 VB | 10 | 5 | - | 2 | - | 3 | 225 | 211 | 14 | 12 |
| 4 Kyndil | 12 | 4 | - | 1 | - | 7 | 267 | 303 | -36 | 9 |
| 5 StÍF | 11 | 3 | - | 1 | - | 7 | 237 | 276 | -39 | 7 |
| 6 VÍF | 12 | 2 | - | 1 | - | 9 | 253 | 307 | -54 | 5 |

**ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN – MENN**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 StÍF | 11 | 8 | - | 1 | - | 2 | 313 | 266 | 47 | 17 |
| 2 Neistin | 11 | 7 | - | 1 | - | 3 | 311 | 294 | 17 | 15 |
| 3 H71 | 11 | 6 | - | 0 | - | 5 | 286 | 274 | 12 | 12 |
| 4 VÍF | 12 | 5 | - | 1 | - | 6 | 334 | 344 | -10 | 11 |
| 5 Kyndil | 12 | 5 | - | 0 | - | 7 | 302 | 327 | -25 | 10 |
| 6 KÍF | 11 | 1 | - | 1 | - | 9 | 269 | 310 | -41 | 3 |

# Botnliðið er raknað við

**Áðrenn jól, var ikki nógv væntað av unga Fleyr liðnum, ið ikki hevði fingið ein einasta sigur, men nú sær út til at vera vent í holuni**

FLOGBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*



*Á myndini sæst Mjølnir sveima hægri, men spurningurin er, hvørt av liðunum ger tað, eftir dystin sunnudagin í Klaksvík*

Eftir jól, hevur mansliðið hjá Fleyr, veruliga sett seg sjálvar í ljósmálan, eftir at teir, heilt óvæntað, vunnu á oddaliðnum SÍ.

### Fram fall og Fleyr blomstrar

Stutt fyri jól var greitt at felagið Fram valdi at taka lið sítt í Meistaradeildini hjá monnum, og tá so tað var framt, vóru tað tryggir leikarar, ið valdu at fara yvir til Fleyr at spæla, meðan aðrir spæla á lægri støði í Fram, meðan upp aftur aðrir, hava valt at gevast heilt við flogbólti.

Teir tryggir leikararnar, ið hava valt at koma yvir til Fleyr hava eisini verið við til at lyft liðið upp á eitt hægri støði, alt fyri eitt. Leikararnar, talan er um, eru Sigmund av Teigum, Suni Juul Petersen og Jens Heri Bolstad Mortensen.

- Vit pressaðu sum óðir menn, og styrkurin av teimum trimum hjálpti heilt sikkurt til, at vit stóðu okkum so væl, segði Høgni Viderø millum annað eftir dystin hjá Fleyr á heimavølli móti oddaliðnum SÍ, ið teir heilt óvæntað vunnu 3-2.

### Stigini vóru hálveraði

Eftir jólasteðgin vóru stigini í bestu mansdeildini hálveraði, og hetta ávirkaði øll liðini, uttan Fleyr, tí teir høvdu ongi stig at hálvera. Og nú, eftir at teir hava vunnið sær ein sigur, hava teir fingið tvey stig, og merkir tað samstundis at teir bert eru trý stig frá oddaliðnum SÍ. So tað komm dátt við hjá øllum liðunum í Meistaradeildini, uttan hjá havnarliðnum Fleyr.

### Suveranar SÍ-kvinnur

Í Meistaradeildini hjá kvinnum er sera væl spælandi SÍ liðið nærum suvernt. Tær hava spælt 11 dystir og hava vunnið 10, og bert tapt tann eina (móti ÍF). Tær liggja tískil á 20 stigum, og tað er fýra fleiri enn ÍF, hóast ÍF manglar ein dyst.

Um vikuskiftið spælur ÍF úti móti botnproppinum Fleyr, meðan oddaliðið tekur ímóti KÍF í Sørvági.

**Flogbóltur**

**Meistaradeild kvinnur**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 11 | 10 | - | 1 | 32 | 9 | 23 | 20 |
| 2 ÍF | 10 | 8 | - | 2 | 26 | 11 | 15 | 16 |
| 3 Dráttur | 10 | 7 | - | 3 | 23 | 16 | 7 | 14 |
| 4 KÍF | 10 | 5 | - | 5 | 20 | 17 | 3 | 10 |
| 5 Mjølnir | 10 | 3 | - | 7 | 14 | 22 | -8 | 6 |
| 6 TB | 11 | 3 | - | 8 | 12 | 26 | -14 | 6 |
| 7 Fleyr | 10 | 0 | - | 10 | 4 | 30 | -26 | 0 |

**Meistaradeild menn**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 7 | 5 | - | 2 | 19 | 11 | 8 | 5 |
| 2 ÍF | 6 | 4 | - | 2 | 14 | 11 | 3 | 4 |
| 3 Mjølnir | 6 | 3 | - | 3 | 12 | 9 | 3 | 3 |
| 4 Fleyr | 7 | 1 | - | 6 | 6 | 20 | -14 | 2 |

## FAKTA

**Dystir um vikuskiftið**

Flogbóltur

***Meistaradeild kvinnur***

| Dagur | Klokkan | Dystir |
|---|---|---|
| 20.01 | 14:00 | Fleyr-ÍF |
| 20.01 | 14:00 | Mjølnir-Dráttur |
| 20.01 | 14:00 | SÍ-KÍF |

***Meistaradeild menn***

| Dagur | Klokkan | Dystir |
|---|---|---|
| 20.01 | 16:00 | Mjølnir-Fleyr |
| 23.01 | 19:45 | Mjølnir-SÍ |